Fiskimálaráðið

Dagfesting: 13-04-2021
Eftirkannað: 07-04-2021

Uppskot til

Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um sjófeingi (Sjófeingislógin)
(Loyvi at landa og avreiða í mesta lagi 15% uttanlands)

§ 1

Í løgtingslóg nr. 152 frá 23. desember 2019 um sjófeingi (Sjófeingislógin), sum broytt við løgtingslóg nr. 59 frá 13. mai 2020, § 78 í løgtingslóg nr. 91 frá 7. juni 2020, løgtingslóg nr. 106 frá 29. juni 2020, løgtingslóg nr. 185 frá 18. desember 2020 og løgtingslóg nr. 186 frá 18. desember 2020, verða gjørdar hesar broytingar:

1. § 41, stk. 1 og 2 verða orðað soleiðis:
"Veiða á fiskiførum undir føroyskum flaggi skal landast og avreiðast um bryggjukant í Føroyum, tó kunnu í mesta lagi 15% av veiðuni fyri hvørt fiskaslag sær, gjørd upp 31. desember fyri árið frammanundan, landast og avreiðast uttanlands.
Stk. 2. Umframt undantakið frá at landa um bryggjukant í Føroyum, sambært stk. 1, 2.-4. lið, kann landsstýrismaðurin áseta nærri reglur um, hvørji fiskasløg, fiskaúrdráttir ella fiskiskapur, heilt ella lutvíst, ella í avmarkað tíðarskeið, eru undantikin avmarkingunum sambært stk. 1."

2. Í § 64, stk. 1, nr. 1 verður aftan á "§ 39, stk. 1," sett: "§ 41, stk. 1,".

§ 2

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Kapittul 1. Almennar viðmerkingar

1.1. Orsakir til uppskotið

Í sambandi við fyriliggjandi uppskot til løgtingslóg um veiðigjøld fyri fiskiskap gevur hetta lógaruppskot vinnuni ein lógartryggjaðan rætt at landa og avreiða 15% av veiðuni uttanlands, samstundis fær TAKS eitt munadyggari grundarlag at áseta veiðigjøld eftir. Í tilmælinum til

fyriliggjandi uppskot til veiðigjaldslógina metir arbeiðsbólkurin á bls. 3, at "*tað hevði verið ein trygd fyri prísásetingina í Føroyum, um ein partur av veiðuni kann avreiðast uttanlands. Hetta hevur serliga víst seg at vera ein avbjóðing, tá tað við hvørt bert er ein veruligur keypari á marknaðinum. Tí er tilmælið frá arbeiðsbólkinum, at sjófeingislógin verður broytt soleiðis, at partur av samlaðu veiðuni aftur skal kunna avreiðast uttanlands*." Við uppskotinum verður tí loyvt, at skip kunnu landa og avreiða í mesta lagi 15% av veiðuni fyri hvørt fiskaslag sær uttanlands. Til tess at tryggja líkskap í vinnuni fevnir lógaruppskotið um øll fiskasløg, hóast fyriliggjandi uppskot til løgtingslóg um veiðigjøld bert fevnir um fiskasløgini makrel, norðhavssild, svartkjaft og botnfisk í Barentshavinum.

1.2. Galdandi lóggáva
Sambært galdandi lóggávu skal øll veiða um bryggjukant í Føroyum, sbr. § 41, stk. 1 í sjófeingislógini. Tó kann landsstýrismaðurin gera undantak frá treytini. Heimild er til at gera undantak í einstøkum førum (§ 41, stk. 3) og í kunngerð (§ 41, stk. 2), sum tað er gjørt við kunngerð nr. 170 frá 30. desember 2019 um landing í Føroyum. Nevnda kunngerð undantekur í løtuni búrfisk, krabba, lodnu, rækjur, rossamakrel, brisling, hvítingsbróður, stinglaks, langasporl, kubbuta, rísna og trant langasporl frá treytini um, at øll veiða skal um bryggjukant í Føroyum.

1.3. Endamálið við uppskotinum
Endamálið við uppskotinum er at gera treytina linari, um at øll veiða hjá fiskiførum undir føroyskum flaggi skal landast um bryggjukant í Føroyum. Við uppskotinum kann vinnan, umframt heimildina í galdandi lóg, í mesta lagi landa og avreiða 15% av veiðuni fyri hvørt fiskaslag sær uttanlands. Hetta fer eisini at geva TAKS eitt munadyggari grundarlag fyri áseting av veiðigjaldinum, sum eisini er eitt av endamálunum við uppskotinum.

1.4. Samandráttur av nýskipanini við uppskotinum
Við uppskotinum fær vinnan ein lógartryggjaðan rætt til at landa og avreiða í mesta lagi 15% av veiðuni fyri hvørt fiskaslag sær, uttanlands. Fyrimunirnir eru, at tað fæst eitt munadyggari grundarlag at áseta veiðigjøld eftir. Fáa skipini betri prís fyri veiðuna uttanlands, fær landið meiri í veiðigjaldi. Hinvegin er vansin við uppskotinum, at ein tílíkur rættur í ávísan mun kann hugsast at ganga út yvir arbeiðspláss í fiskivinnuni á landi.

1.5. Ummæli og ummælisskjal
Uppskotið hevur verið til ummælis hjá Fiskivinnuráðnum, Felagnum Trolbátar og Vørn. Viðmerkingar komu frá Delta Seafood og TG Fish, Fiskivinnuráðnum, Vørn, Felagnum Nótaskip, Vaðhorn, Føroya Arbeiðsgevarafelag og Varðanum Pelagic. Tá ið hoyringarfreistin var úti, var einki hoyringarskriv komið frá Felagnum Trolbátar.

Delta Seafood og TG Seafood vilja vera við, at toskaveiðan og upsaveiðan undir Føroyum er sera vánalig, og tí kemur uppskotið sum steinur omaná byrðu hjá virkjunum. Feløgini vísa á, at uppskotið eisini fer at geva teimum, sum fiska á fjarleiðunum s.s. Grønlandi, Íslandi, Flemish Cap og í Barentshavinum, møguleika at avreiða 15% uttanlands. Mælt verður tí heldur til, um uppskotið verður samtykt, at tey 15 prosentini verða seld á uppboðssølu.

Fiskimálaráðið skilir sjónarmiðið hjá virkjunum, men fer ikki at ganga ynskinum á møti. Tað er ikki eitt ókent fyribrigdi í føroyskari fiskivinnu, at heimilað verður, at ein partur av veiðuni verður landaður og avreiddur uttanlands. Sum dømi um tað kann nevnast, at 25% av veiðuni kundu landast og avreiðast uttanlands sambært løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap. Hóast hetta var loyvt, vístu royndirnar, at tað í minni mun varð landað og avreitt uttanlands.

Fiskivinnuráðið tekur undir við, at loyvt verður aftur at landa ein part av veiðuni uttanlands. Tó verður mett, at 15 prosent er ov lítið, um henda broyting skal muna. Um markið verður sett á bert 15 prosent, er vandi fyri, at møguleikin ikki kann nýtast, tí tá skal hvørt skipið hava eina rímiliga stóra kvotu, áðrenn møguligt er at landa eina last uttanlands og at gagnnýta hendan møguleikan. Tí verður mælt til, at markið verður í minsta lagi 25 prosent, eins og tað hevur verið áður.

Í lóg um vinnuligan fiskiskap hevði landsstýrismaðurin heimild í kunngerð at áseta reglur, sum avmarkaðu avreiðing av veiðu uttanlands til í mesta lagi 25 prosent av veiðuni gjørd upp fjórða hvønn mánað.

Í lóg um fyrisiting av sjófeingi frá 2017 varð upprunaliga skotið upp, at 75 prosent av allari veiðu skuldu landast um føroyskan bryggjukant. Tað vil siga, at í mesta lagi 25 prosent kundu landast uttanlands. Hetta varð tó broytt soleiðis, at øll veiða skuldi landast í Føroyum, uttan at reiðarí og manningarfeløg vórðu hoyrd ella tikin við uppá ráð í viðgerðini.

Mælt verður til, at funnin verður ein javnvág millum ymsu áhugamálini í fiskivinnuni, soleiðis at aftur verður loyvt at landa í minsta lagi 25 prosent av veiðuni uttanlands. Týdningarmikið er eisini, at landsstýrismaðurin varðveitir heimildina til at veita eitt meira umfatandi undantak, tá ið tørvur er á hesum.

Fiskimálaráðið skal vísa á, at endamálið við uppskotinum er ikki, at munandi størri partur av veiðuni skal landast uttanlands. Endamálið við uppskotinum er at geva myndugleikunum eitt munadyggari grundarlag fyri áseting av veiðigjaldinum, eins og atlit framvegis má havast at fiskivinnuni her á landi. Tí verður áheitanin frá Fiskivinnuráðnum ikki gingin á møti um at økja rættarkravið úr 15% og upp í 25%.

Viðvíkjandi ynskinum frá Fiskivinnuráðnum um at hava heimild til at gera undantak frá treytini um, at veiða skal um bryggjukant í Føroyum, so er henda heimild longu í lógini, eins og hon framhaldandi verður varðveitt eftir hesa broyting. Í løtuni hevur landsstýrismaðurin brúkt heimildina í kunngerð nr. 170 frá 30. desember 2019 um landing í Føroyum, sbr. pkt. 1.2. omanfyri.

Vørn metir, at orðingin "*...gjørt upp einaferð um árið,...*" má nágreinast fyri at lætta um umsitingina hjá Vørn. Sum dømi um øðrvísi orðing verður nevnt: "... gjørt upp 31. desember fyri árið frammanundan", e.l.

Fiskimálaráðið hevur tikið viðmerkingina til eftirtektar og broytt tekstin samsvarandi.

Felagið Nótaskip tekur undir við uppskotinum. Tó vísir felagið á, at trupulleikin snýr seg um svartkjaft, sum verður landaður til ídnað í Føroyum. Har er bert ein keypari. Við verandi banni fyri at landa uttanlands, kann hesin keypari áseta prísin uttan nakra kapping frá øðrum. Tá svartkjaftafiskiskapurin er í hæddini, er ofta drúgv bíðitíð eftir landingartørni hjá hesum virki, og tí hevur landsstýrismaðurin seinastu tvey árini loyvt, at tað hevur verið frítt at landa svartkjaft uttanlands í eitt ávíst tíðarskeið.

Felagið Nótaskip heldur, at tað er ikki heppið, at tílíkar ásetingar verða lýstar ár um ár. Ein varandi skipan hevði givið reiðaríunum betri møguleikar fyri at leggja fiskiskapin til rættis.

Sambært felagnum verður trupulleikin ikki loystur, um loyvt verður at landa 15% av veiðuni uttanlands. Lønsemið í svartkjaftafiskiskapinum er tengt at, at veiðiorkan hjá hvørjum einstakum skipi í mest møguligan mun verður brúkt á hvørjum túri.

Skipini, sum eru limir í Felagnum Nótaskip, kunnu lasta millum tvey og trý túsund tons av svartkjafti, og ein last upp á t.d. 2.500 tons krevur eina kvotu upp á 16.700 tons.
Út frá hesum skjýtur Felagið Nótaskip upp, at tað árliga verður loyvt at landa upp til 40% av veiðuni av svartkjafti uttanlands.

Eisini heldur felagið Nótaskip, at tað er av týdningi, at landsstýrismaðurin varðveitir heimildina til at geva meira víðfevnd undantøk, tá tørvur er á tí.

Fiskimálaráðið skal vísa á, at uppskotið gevur øllum ein lógartryggjaðan rætt at landa og avreiða 15% uttanlands. Harumframt varðveitir landsstýrismaðurin sína heimild at loyva landingum uttanlands, sbr. nevndu kunngerð, sum víst verður til undir pkt. 1.2 omanfyri. Fiskimálaráðið metir ikki, at Felagið Nótaskip í nóg stóran mun ítøkiligger, hví verandi støða, har heimilað verður landsstýrismanninum at gera undantak frá kravinum um, at veiða skal um føroyskan bryggjukant, er ónøktandi. Felagið skrivar, at ein varandi skipan hevði givið reiðaríunum ein betri møguleika at leggja fiskiskapin til rættis.

Fiskimálaráðið fer ikki at ganga ynskinum frá Felagnum Nótaskip á møti. Høvuðsendamálið við uppskotinum er at geva eitt munadyggari grundarlag fyri at áseta veiðigjøld og ikki í nógv størri mun at flyta arbeiðspláss av landinum.

Felagið Vaðhorn er harðliga ímóti, at botnfiskur kann landast uttanlands.

Fiskimálaráðið skilir sjónarmiðið hjá Vaðhorn, men fer tó ikki at ganga ynskinum á møti. Tað er ikki eitt ókent fyribrigdi í føroyskari fiskivinnu, at heimilað verður, at ein partur av veiðuni verður landaður og avreiddur uttanlands. Sum dømi um tað kann nevnast, at 25% av veiðuni kundi landast og avreiðast uttanlands sambært løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap. Hóast hetta var loyvt, vístu royndirnar, at tað í minni mun varð landað og avreitt uttanlands. At øll fiskasløg koma undir regluna er fyri at tryggja líkskap millum tey í vinnuni við veiðirættindum.

Føroya Arbeiðsgevarafelag heldur sum útgangsstøði, at kapping á jøvnum føti er góð fyri samfelagið. Tó er eisini greitt, at um aðrar tjóðir hava verjutiltøk mótvegis okkara vinnu, so eigur at verða mett, hvussu opnar dyrnar skulu vera á okkara lítla marknaði. Tað sæst ikki í viðmerkingunum til lógina, um nakrar metingar eru gjørdar av hesum viðurskiftum, tað verður einans skrivað, at orsøkin til lógaruppskotið hevur samband við uppskotið til løgtingslóg um veiðigjøld, sum skulu krevjast inn sambært øðrum lógaruppskoti. Føroya Arbeiðsgevarafelag skal í hesum sambandi enn einaferð vísa á týdningin fyri vinnuna av, at almennu karmarnir eru forútsiguligir og rímiliga stabilir.

Víst verður á, at verandi sjófeingislóg, sum ásetir, at fiskur sum útgangsstøði skal landast í Føroyum, er frá 2019, og nú - bert tvey ár seinni - ætlar sama samgonga at gera tað møguligt at landa part av veiðuni uttanlands. Uttan mun til hvat man annars heldur um uppskotið, gera vinnufyritøkur íløgur og taka avgerðir grundað á teir karmarnar, sum útlit eru til komandi árini. Um tað javnan verða gjørdar týðandi broytingar við stuttum skotbrái í hesum karmum, gerst tað sera trupult at reka lønandi vinnu í hesum landi.

Fiskimálaráðið skal til partin í viðmerkingunum frá Føroya Arbeiðsgevarafelag viðvíkjandi verjutiltøkum viðmerkja, at hetta uppskotið hevur einki at gera við, hvussu opnar ella stongdar føroyskar dyr skulu vera. Tí eru heldur ongar metingar gjørdar hesum viðvíkjandi í viðmerkingunum ella aðrastaðnis. Landsstýrismaðurin hevur í dag fulla heimild at gera undantak frá kravinum um, at øll veiða skal landast um føroyskan bryggjukant. Hetta uppskotið gevur teimum við veiðirættindum ein lógartryggjaðan rætt at landa í mesta lagi 15% av hvørjum fiskaslagi sær uttanlands – umframt rættin sambært kunngerð, sbr. pkt. 1.2 omanfyri. Lógaruppskotið hevur onga regulerandi ávirkan annars á virksemið ella atgongdina til virksemið á landi.

Fiskimálaráðið kann ikki annað enn vera samt við Føroya Arbeiðsgevarafelag í, at tað er av týdningi fyri vinnuna, at almennu karmarnir eru forútsigiligir og rímiliga stabilir.

Fiskimálaráðið kann í hesum sambandi vísa á, at verandi sjófeingislóg miðar ímóti í størst møguligan mun at skipa fiskiskapin við frítt umsetiligum rættindum við 12 ára uppsagnartíð. Sum dømi um hetta kann nevnast, at uppboðssølan av veiðirættindum er avtikin, og flestu menningarkvotur, sum vóru í gildi 1. januar 2020, eru lagdar um til egnar árskvotur.

Viðvíkjandi broytingini eftir tveimum árum, sum Føroya Arbeiðsgevarafelag vísir á, so kann Fiskimálaráðið viðmerkja, at upprunaliga broytingin um hetta kom í gildi í apríl 2018, tá ið undanfarna samgonga sat, og nú – trý ár seinni – verður skotið upp at broyta ásetingina, sbr. løgtingsmál 113/2017.

Varðin vísir m.a. á, at:

1. Grundarlagið hjá uppsjóvarvinnuni á landi minkar við somu nøgd, sum landað verður uttanlands.

2. Virkini leggja stóran dent á, at starvsfólkini hava eina góða og javna inntøku, tá árið er liðugt. Til dømis royna vit at framleiða so nógvan svartkjaft sum gjørligt til matna, sjálvt um skiftisavlopið ikki er stórt fyri svartkjaft, bara fyri at fáa meira støðugt arbeiði fyri starvsfólkini. Men við hesum uppskotinum skera tit minst 15% av teirra ársinntøku.

3. Feløgini eru noydd at hava eina nóg stóra inntøku at svara fyri avskrivingum. Við hesum verða færri tons til at gjalda somu avskrivingar og fastar útreiðslur — tí fáa skipini lægri prís fyri fiskin alt í alt, tí færri tons verða til somu kostnaðir.

4. Skip og manning fara samanumtikið — tá árið er liðugt — møguliga at hava lægri inntøkur, tí tað, sum skipini møguliga (einans møguliga) fáa í hægri prísum fyri hesi 15%, fáa teir lægri fyri hini 85%, tí virkini hava minni ráð.

5. Greiningar av prísum vísa, at føroysku uppsjóvarvirkini geva kappingarførar prísir til skipini, hetta er galdandi fyri bæði sild, makrel og lodnu.

6. Virkini hava seinastu átta árini víst, at tey klára at framleiða allan fiskin, sum føroysku skipini fiska, bæði sild, makrel og lodnu, heldur ikki her er grund til at geva skipunum loyvi at landa uttanlands.

Veruliga motivatiónin fyri uppskotinum kemur til sjóndar í viðmerkingunum kap. 1.4:

"*Fyrimunirnir eru, at tað fæst eitt munadyggari grundarlag at áseta veiðigjøld eftir. Fáa skipini betri prís fyri veiðuna uttanlands, fær landið meiri í veiðigjaldi.*"

Tað er møguligt, at teir fáa eitt annað grundarlag at áseta tilfeingisgjaldið, og møguliga verður tað hægri og møguliga verður tað lægri. Vilja vit ofra arbeiðspláss á landi, vilja vit minka um virðisøkingina í vinnuni, vilja vit gera politisk tiltøk, sum minka um avleitt virksemi í føroysku fiskivinnuteyggjuni og minka um føroyska útflutningsvirðið - bara fyri at umsitingin møguliga kann fáa eitt betri grundarlag at áseta tilfeingisgjald? Tað halda vit er ein skeiv avgerð, og tí eru vit ímóti hesum uppskotinum.

Tá talan er um svartkjaft til ídnað, er trupulleikin ein annar, enn tá talan er um fisk til matna. Í viðmerkingunum til uppskotið, kap. 1.1 stendur:

"Hetta hevur serliga víst seg at vera ein avbjóðing, tá tað við hvørt bert er ein veruligur keypari á marknaðinum."

Hesin trupulleikin verður best loystur, við at landsstýrismaðurin brúkar heimildina, hann hevur, at geva undantaksloyvi fyri skip at landa uttanlands, tá tað er neyðugt, tá føroysku virkini ikki klára at framleiða fiskin. Vit skjóta upp at gera tað meira smidligt, so tað verður lættari og skjótari hjá landsstýrismanninum at taka slíkar avgerðir.

Fiskimálaráðið skilir sjónarmiðið hjá Varðanum, men fer tó ikki at ganga tí á møti. Tað er ikki eitt ókent fyribrigdi í føroyskari fiskivinnu, at heimilað verður, at ein partur av veiðuni verður landaður og avreiddur uttanlands. Sum dømi um tað kann nevnast, at 25% av veiðuni kundu landast og avreiðast uttanlands sambært løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap. Hóast hetta var loyvt, vístu royndirnar, at tað í minni mun varð landað og avreitt uttanlands. At øll fiskasløg koma undir regluna er fyri at tryggja líkskap millum tey í vinnuni við veiðirættindum.

Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

2.1. Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur

At tað í størri mun verður loyvt at landa og avreiða veiðu uttanlands kann vera við til, at skipini fáa betri prís fyri veiðuna. Á tann hátt kann uppskotið fáa jaligar fíggjarligar avleiðingar fyri landið, tí TAKS fær eitt betri grundarlag at áseta veiðigjaldið eftir. Arbeiðsbólkur undir Fíggjarmálaráðnum, umboðandi avvarðandi myndugleikar og fiskivinnuna, metti í sínum tilmæli um skipan fyri veiðigjøld frá 2021 og frameftir, at tað hevði verið ein trygd fyri prísásetingina í Føroyum, um ein partur av veiðuni kann avreiðast uttanlands, tí tað hevur serliga víst seg at vera ein avbjóðing, tá tað við hvørt bert er ein veruligur keypari á marknaðinum.

2.2. Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur

Mett verður ikki, at uppskotið hevur umsitingarligar avleiðingar fyri landið.
Uppskotið hevur ongar umsitingarligar avleiðingar fyri kommunur.

2.3. Avleiðingar fyri vinnuna

Uppskotið hevur avleiðingar fyri vinnuna, tí ein lógartryggjaður rættur at landa og avreiða uttanlands kann geva betri prís og harvið eisini hægri veiðigjald til landið, tá ið tað hevur víst seg at vera ein serlig avbjóðing, at tað við hvørt bert er ein veruligur keypari á føroyska marknaðinum, sbr. nevnda tilmæli.

Umsitingarliga kann uppskotið eisini sigast at hava avleiðingar fyri vinnuna, tí hon skal gera upp avreiðingarnar uttanlands eina ferð um árið, men av tí, at tað ikki er t.d. 4. hvønn mánað, at veiðan skal gerast upp, sum tað hevur verið fyrr, fáa eigarar av skipunum møguleika at skipa so fyri, at avreiðingar uttanlands tilsamans fyri árið ikki koma uppum 15% fyri hvørt fiskaslag sær.

2.4. Avleiðingar fyri umhvørvið
Uppskotið hevur ongar avleiðingar fyri umhvørvið.

2.5. Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum
Uppskotið hevur ikki serligar fíggjarligar, umsitingarligar ella umhvørvisligar avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

2.6. Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir
Uppskotið verður ikki mett at hava avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir.

2.7. Millumtjóðasáttmálar á økinum
Uppskotið er ikki tengt at millumtjóðasáttmálum.

2.8. Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar
Uppskotið er ikki tengt at tvørgangandi millumtjóðasáttmálum s.s. Hoyvíkssáttmálin, Evropeiski mannarættindasáttmálin ella Sáttmáli Sameindu Tjóða um rættindi hjá einstaklingum, ið bera brek.

2.9. Markaforðingar
Ongar kendar markaforðingar eru á økinum.

2.10. Revsing, fyrisitingarligar sektir, pantiheimildir ella onnur størri inntriv
Uppskotið hevur áseting um revsing við sekt, um tað uttan við loyvi frá landsstýrismanninum verður farið upp um tey 15 prosentini fyri landing uttanlands.

2.11. Skattir og avgjøld
Uppskotið hevur ongar ásetingar um skatt ella avgjøld.

2.12. Gjøld
Sjálvt uppskotið hevur ongar ásetingar um gjøld, hóast mann sambært galdandi lóg kann verða álagdur gjald fyri at landa og avreiða uttanlands í ósamsvari við § 41, stk. 1 og 2, sbr. stk. 5.

2.13. Áleggur lógaruppskotið likamligum ella løgfrøðiligum persónum skyldur?
Uppskotið áleggur eigarum av fiskiførum skyldu til at gera upp veiðuna uttanlands eina ferð um árið.

2.14. Leggur lógaruppskotið heimildir til landsstýrismannin, ein stovn undir landsstýrinum ella til kommunur?
Heimildin hjá landsstýrismanninum at áseta nærri reglur sambært § 41, stk. 2 verður varðveitt.

2.15. Gevur lógaruppskotið almennum myndugleikum atgongd til privata ogn?

Nei.

2.16. Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar?
Mett verður ikki, at lógaruppskotið hevur aðrar avleiðingar.

2.17. Talvan: Yvirlit yvir avleiðingarnar av lógaruppskotinum

	Fyri landið ella landsmyndug-leikar	Fyri kommunalar myndugleikar	Fyri pláss ella øki í landinum	Fyri ávísar samfelags-bólkar ella felagsskapir	Fyri vinnuna
Fíggjarligar ella búskaparligar avleiðingar	Ja	Nei	Nei	Nei	Ja
Umsitingarligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Ja
Umhvørvisligar avleiðingar	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur	Nei	Nei	Nei	Nei	Nei
Sosialar avleiðingar			Nei	Nei	

Kapittul 3. Serligar viðmerkingar

3.1. Viðmerkingar til ta einstøku greinina

Til § 1
Til nr. 1
Sum meginregla skal øll veiða hjá fiskiførum undir føroyskum flaggi um bryggjukant í Føroyum. Orðingin “avreiðast”, sum er løgd afturat í 1. pkt. er ein nágreining av galdandi rætti, tí veiðan skal sum meginregla landast og avreiðast í Føroyum. Tó verður við uppskotinum loyvt, at í mesta lagi 15% av veiðuni fyri hvørt fiskaslag sær kunnu verða landað og avreidd uttanlands. Sambært løgtingslóg um vinnuligan fiskiskap hevði landsstýrismaðurin heimild til at loyva avreiðingum upp til 25% av veiðuni uttanlands. Mett verður, at tað er nakað nógv, og tí verður mett, at 15% er meiri hóskandi til tess at tryggja arbeiðsplássini her á landi og at geva TAKS eitt munadyggari grundarlag at áseta veiðigjaldið eftir.

Í mun til tørvin á broytingini verður víst til tilmælið um skipan fyri veiðigjøldum frá 2021 og frameftir, har arbeiðsbólkur undir Fíggjarmálaráðnum við umboðum fyri fiskivinnuna og avvarðandi myndugleikar metir, at tað hevði verið ein trygd fyri prísásetingina í Føroyum, um ein partur av veiðuni kann avreiðast uttanlands. Arbeiðsbólkurin vil vera við, at tað hevur serliga víst seg at vera ein avbjóðing, tá tað við hvørt bert er ein veruligur keypari á marknaðinum. Tí er tilmælið frá arbeiðsbólkinum, at sjófeingislógin verður broytt soleiðis, at partur av samlaðu veiðuni aftur skal kunna avreiðast uttanlands. Tað verður við hesum uppskotinum gjørt.

Stk. 2 verður tillagað broytingini í stk. 1, so at tað verður gjørt greitt, at landsstýrismaðurin framhaldandi hevur heimild í kunngerð at gera undantak frá avmarkingunum í stk. 1, sum loyvir í mesta lagi at landa og avreiða 15% av veiðuni fyri hvørt fiskaslag fær, uttanlands. Sostatt kann landsstýrismaðurin loyva, at meiri enn 15% av veiðuni fyri hvørt fiskaslag sær verður landað og avreitt uttanlands.

Til nr. 2
Ásetingin heimilar revsing við sekt, um tað uttan loyvi verður farið upp um tey 15% sambært § 41, stk. 1.

Til § 2
Lógin kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

Fiskimálaráðið, 13. apríl 2021.

Jacob Vestergaard (sign.)
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert (sign.)

Yvirlit yvir fylgiskjøl:
Fylgiskjal 1: Javntekstur
Fylgiskjal 2: Viðmerkingar frá Delta Seafood og TG Seafood
Fylgiskjal 3: Viðmerkingar frá Fiskivinnuráðnum
Fylgiskjal 4: Viðmerkingar frá Vørn
Fylgiskjal 5: Viðmerkingar frá Felagnum Nótaskip
Fylgiskjal 6: Viðmerkingar frá Vaðhorn
Fylgiskjal 7: Viðmerkingar frá Føroya Arbeiðsgevarafelag
Fylgiskjal 8: Viðmerkingar frá Varðanum